VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
uvmr@uvmr.fo

Tórshavn 29. september 2025

Okkara tilv./Our ref.:
4989-4065/Niels/Fxroya-FAG-B-U
Tykkara tilv./Your ref.:

Ummæli av uppskoti til nýggja ársroknskaparlóg v.m.

Víst verður til uppskot til nýggja Ársroknskaparlóg og tilhoyrandi fylgibroytingum í atknýttum lógum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

Yvirskipað

- Yvirskipað tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við, at ársroknskaparlógin verður dagførd og samanskrivað á føroyskum máli.

Støddarmørk

- FAG tekur undir við, at støddarmørkini verða dagførd, so tey samsvara við tað, sum er galdandi í ES/Danmark. Eingin haldgóð grundgeving er fyri at seta strangara krøv til ársfrásøgnina hjá føroyskum fyritøkum, í mun til danskar fyritøkur við somu stødd.
- FAG heldur tó, at tað eigur at verða grundgivið nærri fyri, hví Uttanríkis- og Vinnumálaráðið ikki ætlar at hava somu støddarmørk í Føroyum fyri fyritøkur, sum kunnu velja víðkaða gjøgnumgongd heldur enn grannskoðan.

  Uttanríkis- og Vinnumálaráðið mælir í viðmerkingunum til varsemi, og skrivar at tað ikki kann útihýsast, at møguligar hækkingar av hesum støddarmørkum koma at merkja, at góðskan á upplýsingunum í ársfrásøgnunum hjá minstu fyritøkunum lækkar, og at upplýsingarnar tískil ikki vera eins álítandi í framtíðini. Hetta kann hugsast at hava neilig árin á roknskapareftirlitið hjá Skráseting Føroya og óbeinleiðis á eftirlitið við skatta- og avgjaldsupplýsingunum hjá vinnufyritøkum, heldur ráðið.

  Tó skal FAG vísa á, at ein av høvuðsniðurstøðunum í eftirmeting, sum danska Erhvervsstyrelsen í 2018 gjørdi av broytingunum í reglunum um revisiónsskyldu var, at "Det har betydning, om selskabet benytter revisor, men ikke om det er revision, udvidet gennemgang, review af årsregnskabet eller regnskabsmæssig assistance til opstilling af regnskabet." [1]

  Í Danmark kunnu fyritøkur í roknskaparflokki B velja víðkaða gjøgnumgongd heldur enn fulla grannskoðan, og í 2018 varð mett, at tað hevur spart hesum fyritøkum fyri tilsamans 1,6 mia kr í grannskoaðarútreiðslum.

[1] Erhversstyrelsen 2018: *Undersøgelse af det fremadrettede behov for revisionspligt*

Mælt verður til, at Uttanríkis- og Vinnumálaráðið neyvari metir um fyrimunir og vansar við at hava somu støddarmørk fyri fyritøkur, sum kunnu velja víðkaða gjøgnumgongd. Um royndirnar í Danmark framvegis benda á, at tað hevur lítlar og ongar neiligar avleiðingar, er torført at skilja, hví føroyskar fyritøkur við somu stødd ikki skulu fáa sama møguleika.

Burðardygdsfrágreiðingar v.m.

- ES er í ferð við at endurskoða sínar reglur um rapportering í s.v. burðardygdsfrágreiðingar, so tær verða minni umsitingartungar hjá fyritøkunum, og tí verður hildið at vera skilagott ikki at gera størri broytingar í ásetingunum um hetta økið í ársroknskaparlógini í hesum umfari. Føroya arbeiðsgevarafelag arbeiðir í tøttum samstavi við sínum limafyritøkum um at menna greiðar mannagongdir fyri, hvussu lyklatøl verða gjørd upp í føroyskum høpi. Endamálið er at tað verður lætt og atkomuligt hjá føroyskum fyritøkum at máta burðardygd og hvønn ítøkiligan mun teirra átøk gera.

Krøv til málið

- Í verandi ársroknskaparlóg er krav um, at ársfrásøgnin og onnur skjøl skulu vera á føroyskum ella donskum máli. Við nýggja uppskotinum fær landsstýrisfólkið heimild at áseta reglur um, hvat mál børsskrásettar fyritøkur skulu nýta til ársfrásøgnina v.m.
  FAG tekur undir við, at børsskrásettar fyritøkur fáa heimild at lata ársfrásøgnina inn á øðrum máli enn føroyskum ella danskt (t.e. á enskum). Heldur enn at áseta tað í kunngerð, heldur FAG tó, at tað eigur at verða ásett beinleiðis í lógini, at hesar ársfrásagnirnar og onnur skjøl kunna vera á føroyskum, donskum ella enskum máli. Í donsku ársroknskaparlógini, sum hevur verið fyrimynd fyri hesum lógaruppskotinum, er beinleiðis ásett í lógini, at ársfrásagnir skulu latast inn á donskum ella enskum máli.
- Í almennu viðmerkingunum til lógina er undir brotinum 1.3.4.3. um málkravið skrivað, at stórar danskar fyritøkur kunna nýtt enskt mál í ársfrásøgnini og líknandi skjølum. Hetta er ikki heilt rætt, tí eftir donsku lógini kunnu allar fyritøkur nýta enskt mál í ársfrásøgnini. Hetta eigur at verða presiserað.
- Spurningurin er eisini, um ikki enskt mál yvirhøvur eigur at verða javnsett við danskt í føroysku ársroknskapalógini. Flestu føroyingar, sum skulu lesa ársfrásagnirnar, skilja líka væl enskt sum danskt, og um fyritøkan hevur nógv samstarv uttanfyri landoddarnar, kann tað geva betri meining at gera ársfrásøginina á enskum heldur enn á donskum.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Niels Winther